Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 17. febr. 2021
Mál nr.: 20/01999
Eftirkannað: 25.01.2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkanøvn
(At taka eftirnavn ella millumnavn við giftu)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apríl 2007, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 2, 1. pkt., verður ", sbr. tó § 2, stk. 4" strikað.

2. Í § 13 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Vilja hjúnafelagar hava sama millumnavn, kann annar teirra, við samtykki frá hinum, boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur millumnavnið hjá hinum, tó ikki um navnið er fingið við giftu."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

3. § 13, stk. 2, sum verður stk. 3, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Hjúnafelagi, ið hevur fingið millumnavn ella eftirnavn sítt við giftu, kann boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur millumnavnið ella eftirnavnið aftur, sum hann bar undan vígsluni, ella tað millumnavnið ella eftirnavnið, sum hann seinast hevur borið, og sum ikki er fingið við giftu."

4. Í § 21, stk. 3, verður aftan á "landsstýrismannin" sett: "í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur fingið áheitanir frá borgarum um at broyta navnalógina, soleiðis at tað gerst møguligt hjá hjúnafeløgum at fáa somu samanseting av millum- og eftirnøvnum.

1.2. Galdandi lóggáva
Millum- og eftirnøvn við giftu
Í dag kann annar hjúnafelagin við samtykki fáa ættarnavnið hjá hinum, men tað ber ikki til at hava somu samanseting av millum- og eftirnøvnum.

Dømi: Um M Olsen giftist við K Joensen, so kann M fáa ættarnavnið hjá K sum sítt eftirnavn, soleiðis at bæði hava Joensen sum eftirnavn. M kann tá velja at nýta Olsen sum millumnavn, soleiðis at fulla navnið verður M Olsen Joensen. Heimild er ikki fyri at loyva K at taka Olsen sum sítt millumnavn, og tískil fer K bert at eita K Joensen. Ætlanin við broytingini er, at M og K fáa møguleika bæði at eita Olsen Joensen.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva hjúnafeløgum at fáa somu samanseting av millum- og eftirnøvnum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Hjúnafelagar fáa við lógaruppskotinum rætt til somu samanseting av millum- og eftirnøvnum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Umhvørvisstovuni, Navnanevndini, Fólkakirkjuni og Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Lógaruppskotið hevur eisini ligið alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Tá ið freistin at koma við viðmerkingum var farin, høvdu Uttanríkis- og mentamálaráðið og Føroya Stiftsstjórn boðað frá, at tey ikki høvdu viðmerkingar til lógaruppskotið. Inn komu ikki fleiri ummælisskriv.

Upprunaliga var tað eisini ætlanin at skerja kærurættin til landsstýrismannin, um heimildin hjá landsstýrismanninum sum kærumyndugleiki sbrt. § 21, stk. 3 er løgd til ein stovn undir landsstýrismanninum. Undirtøka var ikki fyri hesum í samgonguni, og tískil varð hetta tikið úr lógaruppskotinum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið fær umsitingarligar avleiðingar fyri vígslumyndugleikan. Vígslumyndugleikin skal frameftir loyva hjúnafeløgum at fáa millumnavnið hjá makanum.

Lógaruppskotið hevur annars ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið fevnir ikki um millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið er ikki í andsøgn við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki við sær revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Til nr. 1: § 1, stk. 2 í galdandi lóg ásetur hvussu nógv fornøvn, millumnavn og eftirnavn ein persónur kann hava. § 2, stk. 4 í lógini er eitt undantak til meginregluna um, at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Tilvísingin í § 1, stk. 2, til § 2, stk. 4, er tískil ein feilur og verður strikað.

Til nr. 2: Við hesi broyting fáa hjúnafelagar rætt til at taka millumnavnið hjá makanum. Higartil hava hjúnafelagar einans fingið játtað, at eini hjúnafelagin fær eftirnavnið hjá hinum, sbrt. § 13, stk. 1. Heimild hevur ikki verið til at loyva hjúnafeløgum at fáa millumnavnið hjá makanum til sítt millumnavn. Við broytingini fáa hjúnafelagar frameftir loyvi til eisini at fáa sama millumnavn.

Broytingin í *nr. 3* er ein avleiðing av, at tað nú verður heimilað at fáa millumnavnið hjá hjúnafelaganum. Í mun til galdandi lóggávu verður lagt afturat, at ein persónur, sum hevur fingið millumnavn sítt við giftu, kann boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur millumnavnið aftur, sum hann bar undan vígsluni, ella tað millumnavnið, sum viðkomandi seinast hevur borið, og sum ikki er fingið við giftu. Í galdandi lóggávu hevur rætturin einans verið til eftirnøvn.

Í *nr. 4* verður skotið upp, at ein freist upp á 4 vikur verður sett inn í lógina til at kæra avgerðir hjá navnanevndini. Í galdandi lóggávu er eingin freist at kæra eina avgerð hjá navnanevndini.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 17. februar 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Føroya Stiftsstjórn
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum